gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Jóansøkuframsýning í Oynni

**Gallarí Oyggin lat hósdagin upp jóansøkuframsýning. Hetta er fyrsta av sínum slag í Oynni og eisini er tað fyrsta framsýning hjá kendum listamanni í Suðuroynni**

LIST
*Dagfinn Olsen*

Gallarí Oyggin lat hósdagin upp sína fyrstu jóansøkuframsýning. Zakarias Heinesen, Rannvá Mortensen og Palle Julsgart sýna fram.

Fitt av fólki var til fernisering í góðveðrinum. Gallarí Oyggin er nógv ment síðani byrjan. Vakri aldingarðurin er vorðin partur av heildini. Eisini er café komin, Cafe Art, har til ber at hugna sær, meðan listin verður notin.

Síðani byrjan hava ymsar framsýningar verið. T.d. hevur Tróndur Patursson sýnt fram. Hetta var hansara fyrsta sýning í Suðuroynni, síðani sjeytiárini.

Á Jóansøkufamsýningini er ein annar av kendu listamonnunum við. Verk eftir Zakarias Heinesen eru við og er tað hansara fyrsta sýning í Suðuroynni nakrantíð.

Rannvá Mortensen býr í Havn, men er tó lokal. Hon er av Tvøroyri og hevur áður verið við á sýningum á Gallarí Oynni. Palle Julsgart eigur og rekur Gallarí Oynna og er umframt listamálari.

Trupulleikin við sýningini hevur verið, at Zakarias Heinesen eisini sýnir fram uttanlands og at málningar hansara annars verða seldir beinanvegin. Tí gjørdist trupult at fáa eitt úrval til Suðuroyar, men tó eru áskoðarar ikki sviknir. Oljumálningar eru at síggja, men teir eru ogn, so suðuroyingar sleppa ikki djúpt í lumman. Men eisini vatnlitsmyndir eru og tær kann ein ogna sær fyri rímuligan penga.

Palle sýnir fram málningar og Rannvá sýnir eisini fram oljumálningar. Tó er her eitt sindur meira av spennandi royndarvirksemi. Kollasjur eru, og ikki er sørt, at politisk og tjóðskaparlig motiv eru ímillum.

Ein blandað og forvitnislig framsýning, ið bjóðar áskoðaranum av, tí góðskan er ikki at fara skeivur av.

Jóansøkugestir kunnu avgjørt njóta eina løtu í Cafe Art, í aldingarðinum ella bara við at spáka sær millum listaverkini. Er veðrið til vildar, og tað letur til, so er hugnaligt í aldingarðinum, har eisini annað enn blómur er at síggja. Millum livandi runnarnar eru eisini ymiskt til prýðis, millum annað rekaviður, ið Palle hevur havt undir hond.



*Rannvá Mortensen og Palle Julsgart framman fyri ein málning eftir Zakarias Heinesen, ið tíverri ikki kundi vera til staðar, tá jóansøkuframsýningin lat upp í Gallarí Oynni á Tvøroyri hósdagin*

*(Mynd: D. Olsen)*

Til ferniseringina sang Ljómur nakrar sangir og eydnaðist løtan væl. Palle Julsgart segði m.a. í vælkomurøðuni, at hann framvegis ætlar at starvast fyri, at suðuroyingar sleppa at uppliva føroyska list á høgum støði, eins og norðurlendska list.

# Amanda Hansen 75 ár



Í dag veður Amanda Hansen í Klaksvík 65 ár.

Amanda er kend víða í Føroyum fyri virki sítt í felagnum Javna, sum hon eisini var við til at stovna. Og ikki minst var maðurin Karl, sum doyði fyri nkrum árum síðani, eisini sera virkin í Javna.

Amanda er klaksvíkingur burturav. Fødd og uppvaksin í Klaksvík og hevur búð har alla sína tíð.

Hon er dóttir Trinu úr Glasstovuni úr Árnafirði og Jákup í Heimistovuni úr Uppsølum. Tey búsettust á Vágsheygnum, har Amanda er fødd og uppvaksin.

Amanda giftist Karli Hansen av Nesi, vanliga nevndur Tofta Karl. Hann kom ungur til Klaksvíkar í snikkaralæru á snikkaravirkinum hjá Kjølbro á Varpinum, har hann seinni gjørdist meistari.

Í sekstiárunum bygjaði hann egið snikkaravirkið og arbeiddi síðan um alt landið.

Tey bæði, Amanda og Karl, fingu fýra synir, Jákup, Jens, Rana og Finn. Meðan dreingirnir vóru smáir, var Amanda heimagangandi. Seinni hevur hon arbeitt millum annað á flakavirki og sum heimahjálp. Og ikki minst í Dáanum, sum eins og Javni var eitt hjartabarnið hjá henni og Karli.

Sagt hevur onkuntið verið um hana - tað var nokk Bøgesvang, sum átti orðini - at hon man vera ein tann størsti leverandørurin til Hornorkestrið har norðuri.

Og nakað væl av sannleika er í tí. Dreingirnir spæla allir. Teir »smáu« í Klaksvíkar Hornorkestri. Jens tó so mikið avanseraður, at hann hevur verið í bæði donskum politiorkestri og GHM eisini. Og seinnu árini er Jákup eisini farin at spæla horn í Havn.

Jákup er tó helst tann av brøðrunum, sum flestu føroyingar kenna í samband við horntónleik. Tað er hann, sum plagar at ringja til Útvarpið og práta við Kára um horntónleik. Og tað er heilt sjáldsamt, sum hann veit væl um horntónleik, orkestur, dirigentar og hvat nú er at vita.

Føðingardagin verður Amanda stødd hjá soninum Jensi í Tjørnuvík.

***ej***

# Farin til fiskiskap

**Nýggja skipið á Vágsfirði, Roc Amador, er farið til fiskiskap**

SKIP
*Dagfinn Olsen*

Tá vágbingar seldu Sancy, keyptu teir ístaðin størri skip, nevniliga Roc Amador. Nógv umvælingararbeiði er gjørt við skipið og hevur hetta tikið drúgva tíð.

Men mánadagin kom skipið á Vág, har stór mannfjøld fagnaði skipinum. Serstakt og slóðbrótandi er nýggja ís skipanin umborð. Ein skipan, ið íslendingar standa aftanfyri. Vágbingar hava sett pening í og ætla at royna skipanina og vænta sær nógv av henni. M.a.. sigst betri góðska fáast burturúr og harvið eisini betri prísur.

Mikukvøldið stevndi Roc Amador út á fiskileið. Ein íslendingur er við at leggja manningini lag á, viðvíkjandi nýggju ís skipanini.




*Mánakvøldið tók mannfjøld ímóti Roc Amador á bryggjuni í Vági. Mikukvøldið fór skipið út á fiskileið*

*Mynd: D. Olsen*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Føroyar mótmælir hjá NAFO

**Jørgen Niclasen hevur tikið stig til at mótmæla ætlaðu skerjingini av rækjufiskiskapinum á Flemish Cap. Grønland og Danmark taka undir við mótmælinum**

RÆKJUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard og Eyðun Klakstein*

Føroyar, Grønland og Danmark sendu í gjár NAFO eitt skriv, har mótmælt verður, at felagsskapurin ætlar at skerja rækjufiskiskapin á Flemish Cap.

Tað er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, sum er maðurin aftanfyri mótmæli.



*Jørgen Niclasen hevur tikið stig til, at føroyingar, danir og grønlendingar mótmæla ætlaða niðurskurðinm av rækjufiskiskapinum á Flemish Cap, har føroyingar eiga 1600 fiskidagar*

Hann heldur, at føroyingar hava lagað seg til fiskiskapin á Flemish Cap øll árini, og hann heldur onga orsøk verða til, at føroyingar nú skulu skerja sínar 1600 fiskidagar við 16,7 prosentum, soleiðis sum NAFO hevur skotið upp.

NAFO kom við sínum uppskoti um skerjingar fyri trimum mánaðum síðani, og í gjár var freistin hjá avvarðandi londum at siga sína hugsa um uppskotið úti.

Ísland hevur sagt seg verða sinnað at skerja sín fiskiskap við 10%, meðan Letland og Litava ikki eru sinnað at minka um fiskiskapin.

## Fekk undirtøku

Jørgen Niclasen hevur seinasta døgnið verið í ídnum diplomatiskum samrøðum við grønlendingar og danska uttanríkisráðið fyri at fáa hesi at taka undir við einum mótmæli móti skerjingini.

Hetta hevur eydnast honum, tí boð eru komin úr uttanríkisráðnum um, at danir taka undir við mótmælinum, og tað sama gera grønlendingar, sum hava 5000 fiskidagar á Flemish Cap.

Tí er eitt skriv sent NAFO-felagsskapinum, har Føroyar, Grønland og Danmark mótmæla niðurskurðinum av rækjufiskiskapinum.

# Stovna felag fyri minnisveik og avvarðandi

**Mánakvøldið verður fyrireikandi fundur í MBF-húsinum**

MINNISVEIK
*Eirikur Lindenskov*

Mánakvøldið 25. juni verður fyrireikandi furndur til at stovna felag fyri dement, minnisveik. Fundurin verður kl. 19.30 í MBF-húsinum. Endamálið við fundinum er at vita, um fakfólk og avvarðandi eru, ið eru sinnað at virka fyri at felag verður stovnað, sum kann arbeiða fyri at bøta um korini hjá teimum dementu og avvarðandi teirra, tí tað er ein tung og svár uppgáva at liva saman við dementum fólki, sigur Sigrun Mohr, sum er fyriskipari.

– Vit hava eingi tøl í Føroyum fyri, hvussu nógv fólk líða av hesi sjúku, men samanbera vit við londini rundan um okkum, er tað óivað stórt og sigast kann, at uml. 60% av teim dementu líða av alzheimer sjúkuni, sigur hon.

Í londunum rundan um okkum verður nógv kannað og gjørt fyri henda bólkin, og tí halda fyrireikararnir, at løtan er komin at seta hetta á dagsskránna heima hjá okkum.

## Teknikapping á Býarbókasavninum

TEKNIKAPPING

Teknikapping hevur verið á barnabókasavninum. Børnini høvdu nógv góð hugskot til, hvussu eitt bókamerki skal síggja út, so tað var trupult hjá bóka-vørðunum at velja teir fýra vinnararnar.

Tey, sum vunnu, vóru: Eyð Fróðadóttir, 4 ár, Áki Dam Egholm, 6 ár, Sølvi Mortensen, 8 ár og Kristianna Dal Jákupsdóttir, 9 ár. Tey sleppa at velja sær hvør sína føroyska bók sum virðisløn, og tekningarnar hjá teimum verða prentaðar sum bókamerkir.

199 tekningar komu inn, og ta næstu vikuna hava vit framsýning av tekningunum, ið hanga um alt barnabókasavnið.

## I Am til Noregs at spæla

**Føroyski gospelbólkurin verður við á størsta gospelfestivalinum, sum verður hildin í Norðurlondum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fyrst í juli mánaði fer gospelrockbólkurin I Am úr Klaksvík til Noregs at spæla.

Høvið er størsti gospelfestivalurin, sum verður hildin í Norðurlondum. Festivalurin verður í døgunum frá 2. til 8. juli, og hann verður hildin á Risøya.

Festivalurin hevur meiri enn 20 ár á baki, og ørgrynna av kendum gospelbólkum hava spælt á festivalinum. Aftur í ár eru nógv kend gospelnøvn við á festivalinum.

I Am hevur fingið kjansin at spæla á hesum festivali umvegis føroyska felagið, Adore Music, sum hevur gott samband við fólkini, sum standa fyri festivalinum.

Føroyski bólkurin ætlar sær at gera nógv burtur úr í Noregi, og umframt sjálva framførsluni, hevur I Am eisini brynjað seg við ymiskum PR-tilfari um bólkin.

I Am var við í árins Prix Føroyar finalu, og hóast teir ikki endaðu millum teir fremstu, gjørdu teir vart við seg við góðum og melodiøsum tónleiki.

